# Rókur, Mikael og Kári umborð á Høganesi



**Í annaðkvøld, hóskvøldið, kl. 20 verður ein áhugaverd konsert umborð á sluppuni Høganes, sum liggur í bátahylinum í Runavík. Konsertin er liður í Mentanarvikuni í Runavíkar kommunu, sum er í døgunum 23. til 30. oktober**

KONSERT

Konsertin verður í tveimum pørtum. Fyrsta partin syngur og spælir lokali tónleikarin Kári Sverrisson egnar sangir. Kári er upphavið til tónleikabólkin Enekk og er nógv frammi innan føroyska tónleikaheimin, serliga fólkatónleik.

Næsta partin av konsertini syngur og spælir Rókur Jakobsen egið tilfar. Rókur er eisini ein royndur tónleikari og vann fyri nøkrum árum síðan Singer/Songwriter kappingina. Harumframt syngur og spælir Rókur við bólkinum All That Rain, og var hann oddamaður í bólkinum Tangz.

Kendi bassisturin Mikael Blak spælir hetta kvøldið saman við bæði Kára og Róki. Mikael hevur spælt saman við nógvum ymiskum føroyskum bólkum seinastu árini. Millum annað er hann fastur bassistur hjá Teitur Lassen, spælir saman við Enekk, Yggdrasil og kenda bólkinum 200.



*Kári Sverrisson*

Konsertin byrjar kl 20. Atgongumerki á 50 kr. vera seld umborð undan konsertina. Eftir konsertina ber til at leggja leiðina framvið Hæddini, har Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu skipar fyri Jam Session og cafékvøldi kl. 22.00.

WWW.SMYRIL-LINE.COM




Aldri áður hevur tað verið so lætt og so bíligt at ferðast til Danmarkar við egnum bili!

1 FERÐANDI + BIL – FRAM OG AFTUR ........ 500,-

2 FERÐANDI + BIL – FRAM OG AFTUR ........ 1.000,-

2 VAKSIN + 2 BØRN + BIL – FRAM OG AFTUR ........ 1.500,-

Oljuavgjald á kr. 120,- er ikki íroknað nevndu prísir.

Tilboðið er galdandi til og við 30. mars 2006

Bíleggið NÚ á 34 59 00

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

Droym tað ikki – royn tað!

## Hans og Inge Berntsen í Føroyum

LEKINGARMØTI

*tíðindaskriv*

Hósdagin koma Hans & Inge Berntsen til Føroya, har tey fara at tosa - og biðja fyri sjúkum. Skráin hesuferð er umfatandi - tey vera bæði í Havn, í Sandoynni, í Suðuroynni og í Eysturoynni.

Fyrsta tiltakið verður hóskvøldið 20. oktober kl. 20 í Oasuni í Hoyvík. Fríggjakvøldið 21. & leygarkvøldið 22. oktober kl. 20 verða Hans og Inge í Samljóð í Skopun. Sunnudagin 23. oktober kl. 15 eru tey í Skúlahøllini í Trongisvági. Mánakvøldið 24. oktober kl. 20 í Filadelfia í Havn, og týskvøldið 25. oktober kl. 20 í Evangeliihúsinum í Havn. Seinasta tiltakið á vitjanini hesuferð verður mikukvøldið 26. oktober kl. 20 í Kelduni í Skálabotni.

Sum altíð, so er stílurin hjá Hans og Inge ótrúliga lættur og óformellur. Hevur tú hug at uppliva Hans og Inge Berntsen hesar dagarnar, so ert tú vælkomin til eitt ella fleiri av tiltøkunum. Tey leggja stóran dent á at kunna biðja persónliga fyri fólki - eisini hesuferð verður møguleiki fyri persónligari fyrbøn fyri øllum, sum ynskja tað.

**Skráin fyri møtirøðina er hendan:**

Hóskvøldið 20. oktober
kl. 20 í Oasuni í Hoyvík
Fríggjakvøldið 21. oktober
kl. 20 í Samljóð í Skopun
Leygarkvøldið 22. oktober
kl. 20 í Samljóð í Skopun
Sunnudagin 23. oktober
kl. 15 í Skúlahøllini í Trongisvági
Mánakvøldið 24. oktober
kl. 20 í Filadelfia í Havn
Týskvøldið 25. oktober
kl. 20 í Evangeliihúsinum í Havn
Mikukvøldið 26. oktober
kl. 20 í Kelduni í Skálabotni

Lesið Sosialin -so eru tit við!